Aksel V. Johannesen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um sjúkradagpening til sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í smáum fyritøkum, settur landsstýrismanninum við almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvørjar møguleikar hava stjórar í smáum fyritøkum at fáa sjúkradagpening?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at ávikavist sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í smáum fyritøkum eru nóg væl tryggjað, tá tað kemur til mista inntøku í sambandi við sjúku?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um endurskoða dagpeningalógina til tess at tryggja, at eingin dettur niðurímillum?

Viðmerkingar:
Sambært § 3 í dagpeningalógini kunnu vanligir løntakarar, sjómenn, útróðrarmenn og sjálvstøðug vinnurekandi, sum ikki ella í lítlan mun hava leysa arbeiðsmegi afturat sær, umframt persónar, sum tekna eina sjálvbodna trygging eftir kap. 7 í dagpeningalógini, fáa dagpening í sambandi við mista inntøku ella trygging, um tey verða sjúk ella skadd.

Fleiri detta tó niðurímillum. Tað eru til dømis stjórar í smáum fyritøkum, sum vanliga høvdu verið sjálvstøðugir vinnurekandi, men sum hava stovnað eitt felag so sum smápartafelag. Undanfarni landsstýrismaður við almannamálum, Eyðgunn Samuelsen, bøtti um hesi viðurskifti við at leggja fram uppskot um at víðka dagpeningaskipanina til at fevna um stjórar í egnum felag við tí treyt, at felagið ikki ella í minni mun hevði arbeiðsmegi afturat sær. Løgtingið samtykti uppskotið í mai 2017[1]. Í hesum sambandi varð víst á, at talan var um eina varisliga broyting, og at lógin átti at blivið endurskoðað tvey ár seinni. Tað eru nú fýra ár síðan broytingarnar, og enn eru tær ikki endurskoðaðar. Stjórar í smáum fyritøkum, sum hava nakað av arbeiðsmegi afturat sær, detta sostatt framvegis niðurímillum við tað, at teir ikki eru fevndir av lógini um sjúkradagpening. Hetta hevur við sær, at stjórar í smáum feløgum ofta liva í støðugum ótta fyri at gerast sjúkir, tí tað kann raka felagið og starvsfólkini í felagnum meint. Somuleiðis kann tað halda summum frá at átaka sær stjóraheitið í so smáum fyritøkum, tá hetta í nógvum førum í størri mun er formalitetur enn nakað annað.

Fyri at fáa greiðu á, um landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at taka fleiri stig til tess at bøta um viðurskiftini hjá smáum vinnurekandi, verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi 8. mars 2021

Aksel V. Johannesen

[1] (84/2016 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.).